FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 7. februar 2022
J. nr.: 22/01800
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-117/2021 frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um hagtøl fyri avlýsingar á Suðuroyarleiðini

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvar avlýsingar hava verið á Suðuroyarleiðini frá 1990 til í dag?
2. Hvussu býta avlýsingarnar seg mánaðarliga og árliga fyri hvørt einstakt skip á leiðini - eisini fyri avloysaraskip?

Svar til fyrispurning 1 og 2
Spurt verður um neyv hagtøl fyri avlýsingar hjá Strandferðsluni seinastu 32 árini. Strandferðslan upplýsir, at stovnurin ikki hevur skipaði hagtøl fyri avlýsingar fyri tíðarskeiðið 1990 - 2014, men hevur hinvegin skipað hagtøl fyri avlýsingar fyri 2015-2022. Svarið uppá fyrispurningin er grundað á hagtøl frá Strandferðsluni.


Greitt verður fyrst frá málinum um reglusemi í breiðum høpi, fyri at fáa eina heildarmynd av støðuni, tí fyritreytirnar hjá Strandferðsluni at røkja Suðuroyarleiðina eru sera nógv broyttar.

<u>Túratal</u>
Í tíðarskeiðinum 1991 – 2000 (10 ár) vóru sambært Strandferðsluni í miðal 1.050 túrar millum Havnina og Suðuroy um árið. Í 2010 var túratalið um Suðuroyarfjørð umleið 1.650 um árið.

Eftir galdandi ferðaætlan siglir Smyril 365 dagar um árið, og siglir 18 ferðir tur/retur, ella 36 ferðir um Suðuroyarfjørð um vikuna. Árliga túratalið um Suðuroyarfjørð er eftir hesum 1.872. Sí talvu 1. beint niðanfyri.

Strandferðslan upplýsir, at túratalið er økt við eini 822 túrum í tíðarskeiðinum, sum svarar til 77,3%. Økt túratal merkir, alt annað óbroytt, fleiri avlýsingar.

Talva 1. Túratal hjá Smyrli 1989-2020



	1989-1990	1991	1992	1993	1994	1995	1996	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Túratal	1472	1228	1228	940	940	940	924	924	1100	1150	1150	1200	1400	1400	1400	1400	1400	1700	1700	1700	1650	1650	1664	1664	1664	1680	1832	1872	1872	1872	1872

Ferjur
Strandferðslan hevði tvey skip tøk á Suðuroyarleiðini, Smyril og Teistan til seint í 1997, tá Teistin var seldur. Teistin var settur inn á Suðuroyarleiðina tá tørvur var á tí.

Virksemi (ferðaætlanin) kundi tí leggjast betri til rættis í sambandi við viðlíkahald, teknisk brek, dokkingar og annað, og reglusemi var tí gott á farleiðini.

Síðan Teistin var seldur í 1997, hevur Smyril einsamallur verið álitið á Suðuroyarleiðini. Tá fleiri túrar verða sigldir einstaka dagin, er til dømis ikki plass í ferðaætlanin til at útseta ein túr til seinri á dagin, í staðin fyri at avlýsa.


Hvíld
Strandferðslan greiðir frá, at hvílureglurnar hjá manningunum eru herdar og ávirkar tað fleksibilitetin. Manningarnar hava ikki loyvi til at sigla meiri enn 13 tímar um dagin. Verður hvílitíðin ikki hildin hevur skipið ikki loyvi til at loysa morgunin eftir.

Hagtøl, avlýsingar
Strandferðslan upplýsir, at í tíðarskeiðinum 2015 – 2022 hava tað verið millum 14 og 40 avlýsingar árliga. Størsta orsøkin til avlýsingar er veðrið, meginpartin á hávetri. Í mun til samlaða túratalið, eru avlýsingar millum 0,75% til 2,14%

Tá avloysaraskip eru fyri Smyril, verður vanliga siglt væl færri túrar (avmarkað ferðaætlan), sum verður skrásett sum avlýsingar. Nakrar avlýsingar eru vegna teknisk viðurskifti, umvælingar, dagføringar, eftirlit og annað.

Sí niðanfyri talvu 2, 3, 4, 5 og 6 við yvirliti yvir avlýsingar á Suðuroyarleiðini.

Talva 2. Avlýsingar á Suðuroyarleiðini 2015- 2022 (strikumynd), lutað á veður og aðrar orsøkir




Talva 3. Avlýsingar á Suðuroyarleiðini 2015 – 2022, lutað á ár og ymiskar orsøkir


Avlýsingar	Veður	Atløga	Teknisk viðurskifti	Avloysaraskip	dagf. motor	Umvælingar	Eftirlit	Í alt
Avlýsingar 2015	16	0	1	0	2	6	0	**25**
Avlýsingar 2016	22	0	4	0	0	0	0	**26**
Avlýsingar 2017	14	0	0	26	0	0	0	**40**
Avlýsingar 2018	12	0	2	0	0	0	0	**14**
Avlýsingar 2019	2	0	0	24	0	0	0	**26**
Avlýsingar 2020	7	2	6	0	2	10	0	**27**
Avlýsingar 2021	23	2	2	0	2	0	6	**35**
Avlýsingar 2022	18	0	2	0	3	0	0	**23**
Samanlagt	**114**	**4**	**17**	**50**	**9**	**16**	**6**	**216**

* Atløga: Avlýsingar vegna trongar umstøður í Tórshavnar Havn.
** Avloysaraskip: Avmarkað ferðaætlan (skrásett sum avlýsingar).

Talva 4. Túratal í ferðaætlanini, og avlýsingar hjá Smyrli 2015 – 2022



Talva 5. Avlýsingar í prosentum í mun til túratal hjá Smyrli



Talva 6. Avlýsingar á Suðuroyarleiðini 2015 – 2022, lutað á mánaðir og ár.

Avlýsingar	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	í alt
Januar	8	12	0	0	2	0	0	23	**45**
Februar	2	4	4	0	0	0	10	0	**20**
Mars	2	2	2	0	0	0	3	0	**9**
Apríl	0	0	10	0	0	0	0	0	**10**
Mai	0	0	24	0	0	0	0	0	**24**
Juni	0	0	0	0	0	0	0	0	**0**
Juli	0	2	0	0	0	2	0	0	**4**
August	0	0	0	0	0	0	0	0	**0**
Septembur	0	0	0	0	12	0	0	0	**12**
Oktobur	0	0	0	4	12	6	4	0	**26**
Novembur	2	0	0	4	0	13	16	0	**35**
Desembur	11	6	0	6	0	6	2	0	**31**
íalt	**25**	**26**	**40**	**14**	**26**	**27**	**35**	**23**	**216**

Farmaskip/eykaskip
Sum kunnugt arbeiðir Strandferðslan við eini loysn, har eitt skip verður keypt til at røkja farmaflutningin millum Havnina og Suðuroy, og sum eisini verður avloysaraskip fyri Smyril.

Við hesum fæst ein greiður skilnaður millum vinnuligan farmaflutning og ferðafólkaflutning á Suðuroyarleiðini, og reglusemi verður enn betri tá eykaskip er tøkt.

Tinganes, 7. februar 2022

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum